# 5.000



*Eivør er millum tey royndu, ið luttaka í kappingini*
*mynd: Símun Jóanesarson)*

ni at hava onkran úr øðrum londum, men hetta varð tíanverri av ongum. Men við at skeita eftir listanum av dómarum, sæst greitt, at her eru nógv sera dugnalig og týdningarmikil fólk innan ídnaðin.

Vinnarin av sangskrivarakappingini fær 75.000 kr., nummar 2 fær 20.000 kr. og nummar 3 fær 5.000 kr. Pengingurin er oyramerktur til eina tónleikaframleiðslu t.d. fløguupptøku, sjónbandalag ella annað.

# Gestir á AME-Føroyar



*Gestir er vorðin ein av okkara fremstu tónleikabólkum, og styrkir munandi um Føroysku AME skránna.*
*mynd: Símun Jóannesarson*

**Tað er longu kunngjørt, at Gestir luttaka á AME-Reykjavík, men nú er greitt at, at teir eisini verða at síggja á stóra sýnisgluggatiltakinum AME-Føroyar, ið verður vikuskiftið 13. og 14. apríl í Norðurlandahúsinum.**

ATLANTIC MUSIC EVENT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Teitur, ið vann heiðurin fyri bestu fløgu, á Planet Awards og við hesum heiðurin at luttaka á AME-Føroyar, fekk ikki luttikið av tí, at hann er upptikin av øðrum konsertum hetta vikuskiftið í apríl. Hansara luttøka á AME-Føroyar varð tí bjóða til bólkin, ið handan fløguna, ið fekk annað pláss í Planet Awards, nevniliga Gestir. Kappingin um bestu fløgu var sera tøtt, Stay Under The Stars vann við 27,5% yvir Burtur frá toftunum, ið fekk 25,9%.

Tey árini, ið eru fráliðin síðan bólkurin vann Prix Føroyar hevur ment hann, og fyrsta útgávan, Burtur frá toftunum verður av flestu ummælarum mett sum eitt meistaraverk. Fløgan hevur fingið avbera góð ummælir.

Eisini á konsertum er bólkurin vorðin ein av bestu føroysku bólkunum. Gestir hava luttikið á AME tiltøkum í Føroyum, á báðum AME tiltøkunum í Vega í Keypmannahavn umframt á AME-Reykjavík í fjør.

Herfyri skrivaðu Gestir undir umboðssáttmála við umboðsstovuna Plan C, við Christian Ulf-Hansen og Sam Blue, ið eisini umboða Teit. Bólkurin hevur eisini gjørt avtalu við booking agentin hjá Teiti, Ulrich Lauridsen frá Glorious Records & Music Management. Hetta má stutt sagt metast sum ein stór styrkjan av skránni á AME-Føroyar.

Umframt Gestir spælir GBOB vinnarin Deja Vu, 200 og íslendsku Ampop, grønlendski Angu, svenska Molinder Band, norska Grand Island og donsku Die Dumme Dänen.

# Áhugaverdur føroyskur poppur á myspace

**Millum nógvu føroysku tónleikanøvnini á myspace er Jan Rasmussen, ið spælir glaðan sjálvproduseraðan popp við íblástri frá rokki.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tónleikurin hjá Jan er sera fjart frá tí, ið vanliga er at hoyra á føroyska tónleikapallinum. Hann kallar tað sjálvur gittargrundaðan popp/rokk og hetta er ein rættiliga góð lýsing av tónleikinum, serliga tí hann nevnur poppin áðrenn rokkin.

Jan er 27 ára gamal runavíkingur. Hann lesur medisin í Danmark, og verður eftir ætlan lækni í summar.

Hann sigur at hansara størsta passión er at skriva tónleik, ið hann sjálvur tekur upp og framleiður í sínum heimaupptøkuhøli. Jan hevur spælt gittar, síðan hann var tannáringur. Á hansara síðu liggja 4 løg Broken, Falling Leaf, Gone og nýggja lagið, ið júst er lagt á síðuna I Might Find You.

Vitja Jan Rasmussen á myspace.com/janrasmussen.

# Kafé-kvøld í Virkishúsinum

**Mikukvøldið og hóskvøldið verða kafékvøld í Virkishúsinum í Klaksvík, har livandi tónleikur verður á skránni.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikukvøldið verður tónleikur við Elly og Rakul. Vinkonurnar báðar, sum hava sína dagligu gongd á Føroya Læraraskúla, eru ikki heilt óvanar við at framføra - tær hava verið at hoyrt meir enn einaferð á t.d. Hafnia Lounge. Hesa ferð gongur leiðin so norð til Klaksvíkar, har tær fara at hugna um fólk við gittara og sangi. Tær fara at spæla eina blanding av egnum løgum og láníløgum.

Hóskvøldið 22. mars verður tað Alvilda Mørkøre sum fer at syngja. Við sær hevur hon ongan beiggjan Jón Mørkøre, ið spælir gittar. Alvilda er heldur ikki heilt óvon við at framføra, og hevur hon eina framúrskarandi rødd. So spennandi verður at líða á hóskvøldið

Tað er ókeypis atgongd og 13 ára aldurmark - eisini tit eldri enn 18 ár eru hjartaliga vælkomin.

# Tit Skriva Vit Spæla lutar ein bunka av fløgum út



Útvarpið lutar vanliga út fløgur í sendingini Tit Skriva Vit Spæla, men í sambandi við Spæl Føroyskt Dagin, verður vinningurin risa stórum, tilsamans eini 50 fløgur verða lutaðar út.

Elis Poulsen vertur í sendingini greiddi í morgun frá, at hósmorgunin fara tey at draga lut millum innsendu brøvini hesa vikuna, har er m.a. pakkið við 30-50 ymiskum fløgum, ein annar pakki við teimum seks útvarpsfløgunum, og so fleiri stakar fløgur.

Tey sum ynskja at luttaka í lutakastinum, kunnu skriva til tsvs@uf.fo, við ynski um at hoyra eitt lag.